HEILSUMÁLARÁÐIÐ

4. desember 2020
Mál: 19/00989-28
Viðgjørt: BL

**Broytingar í autorisatiónslógini til hoyringar**

Hervið verður sent til hoyringar: uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar “Anordning om ikrafttræden for Færøerne af forskellinge love om ændring af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed.”

Autorisatiónslógin varð sett í gildi í Føroyum í 2013. Síðani eru fleiri broytingar gjørdar í lógini. Endamálið við hesum lógaruppskoti er at dagføra galdandi autorisatiónslóg, soleiðis at hon samsvarar við donsku lóggávuna á økinum.

Í lógaruppskotinum eru m.a.:

- Ásetingar um, at virkisøkið hjá kiropraktorum er broytt
- Ásetingar um, at osteopatar kunnu fáa autorisatión
- Ásetingar um, at tannlæknar kunnu gera operativ inntriv
- Ásetingar um, at ambulansuviðgerar, herundir eisini ambulansuviðgerar við serligum førleikum (paramedicinarar), kunnu fáa autorisatión
- Ásetingar um, at viðgerarfarmaceutar, sum eru starvsettir á apotekum í primergeiranum, kunnu fáa autorisatión
- Áseting um forboð ímóti konstruktión av kunstigari hymen (jomfrúhindu)
- Ásetingar um krøv til nálakupunkturviðgerð
- Ásetingar um, at sjúkrahúslæknar kunnu fremja læknaliga rúsevnisviðgerð av persónum, ið eru innlagdir á sjúkrahús
- Ásetingar um hoyriapparatviðgerð.

**Vinaliga send viðmerkingar tykkara til hjálagda lógaruppskot til Heilsumálaráðið á teldupostadressu hmr@hmr.fo í seinasta lagi 11. januar 2021.**

Vinaliga

Birita Ludvíksdóttir
løgfrøðiligur ráðgevi

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn • Tel: +298 304050 • hmr@hmr.fo